# Sendiharrar hittu føroyska list

## Sendiharrar úr øllum heiminum fingu høvi at síggja føroyska list, tá løgmaður bjóðaði til føroyska mentanarviku á Bryggjuni

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Ólavur Jóannesarson Hansen*



*Brandur Patursson, Hansina Iversen og lítli sonurin heilsa uppá løgmann*

Næstseinasta vikuskifti læt stóra framsýningin »Føroysk Samtíðarlist« upp á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn.

Sendiharrar úr øllum heiminum vóru bodnir við, tá Kaj Leo Johannesen, løgmaður, setti framsýningina og millum annað segði soleiðis í setanarrøðuni

- Saman við okkara grannum í norði og tykkum vitjandi, hava vit eisini savnað altjóða samstarvsfelagarnar hjá Føroyum kring okkum í dag. Hetta er í sær sjálvum dømi um, at Føroyar hava sett sær sum mál at átaka sær alt fleiri uttanríkispolitiskar uppgávur, sjálvt um Føroyar framvegis eru ein lutfallsliga nýggjur leikari á altjóða pallinum

Føroysk myndlist hevur har aftur ímóti longu leingi verið ein sjálvstøðugur leikari á altjóða pallinum. Hetta hóast føroysk myndlist má metast at vera ung í størri høpi.

- Tað var her við Norðurbryggjuna, at føroysk skip løgdu at kei við sínum dyrabæra farmi av bundnum troyggjum og hosum, skinnum, fiski og lýsi til lampurnar sum lýstu upp í Keypmannahavn.

Enn í dag koma skip úr Norður Atlantshavi við farmi til hetta húsið. Á summarframsýningin í fjør var tað Tróndur Patursson, og fyrrárið var tað Zacharias Heinesen, sum fyltu hølini við sínum málningum.

- Til hesa summarframsýningina er listamálarin Zacharias Heinesen biðin um at velja út nøkur listafólk og verk, sum vísa ymiskleikan, dýpdina og dygdina í føroyskari myndlist í dag. Framsýningin endurspeglar altjóðagjørda veruleikan, sum eyðkennir okkara tíð. Listafólkini eru føroyingar, sum hava nomið sær listarliga útbúgving uttanlands, har tey eisini hava sett síni listarligu spor. Tey vísa veg inn í framtíðina og eru í felag við til at seta dagsskránna á altjóða pallinum.

Við støði í okkara aldargomlu felags søgu, hittast vit nú sum fyrr kring dýrabærar gripir, her mennist norðuratlants diplomati, og her samskiftir list og mentan tvørtur um landamørk og vísir á nýggja farleiðir.



*Herálvur Joensen, føroyskur sendimaður í Keypmannahavn, flytur fram røðu*



*Løgmaður heilsar uppá sendiharran úr Írlandi. Aftanfyri síggjast Herálvur Joensen, føroyskur sendimaður í Keypmannahavn og sendiharrin úr Sweiss*



*Kaj Leo Johannesen fekk eisini orðið á sendiharran úr Tjekkia*



*Løgmaður heilsar uppá sendiharran úr Kina og skrivara hansara. Aftanfyri sæst belgiski sendiharrin*



*Løgmaður fær orðið á sendiharrarnar úr Týsklandi og Pakistan*